**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing

## Fyrstilærari í Norðskála/Oyrar skúla

Starvið sum fyrstilærari í Norðskála/Oyrar Skúla verður lýst leyst til setanar frá **1. august 2003.**

Skúlaárið 2003/2004 verða 49 næmingar í 7 árgangum í skúlanum. 6 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Eysturoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Norðskála/Oyrar skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal vera Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 29. apríl 2003.**

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

9. apríl 2003
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 – 110 Tórshavn
Telefon 355050 – Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Tíðaravmarkað starv í Føroya Skúlabókagrunni

Fyri eitt av starvsfólkum okkara í farloyvi verður tíðaravmarkað avloysarastarv í Føroya Skúlabókagrunni, frá 1. august 2003 til 1. august 2004, lýst til setanar.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, her undir ráðgeving og vegleiðing at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava kunnað seg við tørvin á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, yrkisligur førleiki, góður kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 19. mai 2003.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, á telefon 316100.

Tórshavn, 10. apríl 2003

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100 · www.fsg.fo


HESTPRENT
BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2


alkohol
Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú hevur meira enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum?
Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og dómurin er galdandi í 3 ár!
rff

bilbeltið
Minst til bilbeltið!
Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.
rff



# Lærarar til Miðnámsskúlan í Suðuroy

Við *Miðnámsskúlan í Suðuroy* eru – treytað av góðkenning myndugleikanna – nøkur størv sum adjunktur ella lektari í hesum lærugreinum leys at søkja frá 1. august 2003: **Evnafrøði, týskum** og **samfelagsfrøði**.

Umsøkjarar skulu tilskila, í hvørjum lærugreinum (høvuðsgrein, hjágrein og møguliga øðrum lærugreinum) teir innan studentaskúla- og HF-skipanina hava undirvísingarførleika, og um teir hava námsfrøðiliga útbúgving.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vita um hetta. Herumframt fer skúlin at leggja dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi og nýggjum arbeiðshættum.

Vit eru í ferð við at byggja nýggjan skúla og rokna við at nýggir lærarar verða við at forma hann. Serliga má lærarin í evnafrøði taka aktivan lut í skapanini og sniðgevingini av einum nýggjum evnafrøðishøli.

Umsøkjarar kunnu fáa meira at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans.

Umsøkjarar, ið ikki hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, kunnu søkja um setan sambært treytunum í 2-ára sáttmála. Hetta merkir, at umsøkjari verður settur í eitt 2 ára tíðaravmarkað starv, og at skúlin rindar flyti- og ferðaútreiðslur aftur og fram millum verandi bústað og Miðnámsskúlan í Suðuroy. Upphæddin til flytiog ferðaúeiðslur er í mesta lagi 30.000 kr., og er hon skattskyldug. Um viðkomandi seinni ynskir at søkja fast starv við Miðnámsskúlan, verður søkt á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar.

Umsóknin skal stílast til Mentamálaráðið, men sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, att. Ole V. Laursen, deildarleiðara, Postboks 130, FO-900 Vágur, í seinasta lagi 5. mai 2003.

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**
Postboks 130
FO-900 Vágur
ole@midnam.fo
tlf. 373622

Ístaðin fyri at keypa nýtt

Vit lakera alt innbúgv, so tað verður sum nýtt.
Skápshurðar og innhurðar
Ein bíligari loysn
Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 · Tlf. 321206 · fax 321236 eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
VÆLKOMIN Á HOTEL VÁGAR!
Gerð páskini eitt sindur hugnaligari!

Páskauppihald
v. morgunbuffet fyri hvønn 250,-
Ókeypis fyri børn undir 12 ár í fylgi við vaksnum.
Stórur og lekkur
PÁSKADØGURÐI
- frá skírisdegi til 2. páskadag
Forrættur:
Rækjubland ella aspargessuppa við heimabakaðum breyði
Steik:
Heilstokt tjógv av Krúnveiðidjóri, borðreitt við rómasós, waldorffssalati og pommes røsti
Omaná:
Heimagjørdur ísur við frukt
145,-
børn ½ prís
Vit skapa rammurnar fyri einum framúr uppihaldi!
HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

SUZUKI LIANA 1,6
169.500,-
Ein rúmligur familjubilur við nógvari útgerð, so sum:
Aircondition
Alufelgur
Hiti í setrunum framman...

www.suzuki.fo
Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og Verkstaður
Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375 • Fax 31 14 95
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo • Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10